# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

20. november fingu Jórun og Nurlan Malaikev, Vestmanna, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3750 gr.

26. november fingu Birgith Danielsen og Kristin Martin Jacobsen, Nexø, Bornholm, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3100 gr.

28. november fingu Eyðgerð og Marner Joensen, Vestmanna, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

28. november fingu Laufey Oskarsdóttir og Pauli V. Hansen, Argjum, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4550 gr.

29. november fing Elisabeth og Rói Joensen, Kvívík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4530 gr.

29. november fingu Oddny Clementsen og Henrik Juul, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3750 gr.

30. november fingu Eyðhild og Herfinn Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3350 gr.

30. november fingu Malan og Torben Nielsen, Glyvrum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4550 gr.

1. desember fingu Hanna Maria og Poul Poulsen, Sandi, eina dóttur. Hon var 45 cm long og vigaði 2485 gr.

1. desember fingu Annie Joensen, Klaksvík, og Allan Samuelsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3200 gr.

2. desember fingu Andrias Sundskarð og Signy A. Thorgeirsson, Argjum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.

2. desember fingu Jana Jacobsen og Sylvin Rasmussen, Húsar, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3100 gr.

## Dagurin

**6. desember. Nikolaus,** deyður í umleið ár 350. Hann var biskupur í Myra, sum er í Lítluásiu. Hann varð tikin av døgum sum pínsluváttur, men við grøv hansara í Myra hendu so mong undurverkini, at hann skjótt varð roknaður sum halgimenni. Halgisøgurnar gjørdust eisini nógvar um tær undurgerðir, hann útinti, meðan hann var á lívi. M.a. var ein halgisøga um, at hann bjargaði trimum sjómonnum í havsneyð, og hann gjørdist ein av verndarunum fyri sigling.

*Niclasar*- ella niklamessa hevur verið hildin í Føroyum. Og ein gomul føroysk vísa er um Niclas, har niðurlagið er: *Hjálpi mær Guð og ríki harrin, Santa Niclas.*

Dýrkanin av honum fór víða um, og nevnt kann vera, at í íslandi vóru ikki færri enn 44 kirkjur og kapell vígd honum. Í Hálandi varð hann róptur *Sinte Klaas,* og haðani kom dýrkanin til Amerika, har hann varð róptur *Santa Claus,* sum gevur børnunum gávur á jólum og er tann sami, sum nú á døgum verður róptur jólamaðurin. Hann hevur í grundini einki við jólini at gera, men siðurin at geva gávur er komin í av eini halgisøgu um, at Niklas eina náttina tveitti einum fátækum aðalsmanni pening inn í húsið til heimanfylgju hjá dóttrini.

Navnið er upprunaliga grikst, sett saman av orðunum nike ið merkir *sigur* og *laos*, ið merkir fólk.

*A.C. Evensen var føddur hendan dagin í 1874.*

**7. desember. Agaton,** deyður í ár 250. Rómverskur hermaður, sum var kristin og varð tikin av døgum, tá ið Decius var keisari.

Grikska navnið merkir *góður*.

**8. desember. Gitnaðardagur Mariu.** Mariumessa, hildin til minnis um, tá ið hon var gitin í móðurlívi.

## Minningarorð um
# Gunnar Berg

**Føddur 03.05.72 Deyður 04.11.03**



Sera tung vóru boðini, vit fingu 4. november 2003, um at Harrin longu hevði tikið teg heim til sín, bert 31 ára gamal. Tað er ikki til at skilja hví. At vit ongantíð skulu vera saman aftur her á jørð, serliga nú á jólum, tá tú skuldi koma heim at halda jól saman við okkum øllum. Vit gleddu okkum øll sera nógv til at síggja teg aftur, nú tú hevði búð niðri í 9 mánaðir. Eg og Muddi vóru og vitjaðu teg í summar og tað eru vit sera glað fyri, tað var deiligt sum altíð at vera saman við tær.

Eg eri ein av teimum, sum kendi teg best, av tí at tit búðu í kjallaraíbúðini heima hjá okkum, og av tí at tað vóru bara tvey ár ímillum okkum, so vit vuksu upp saman sum systkin. Tú var 10 ára gamal, tá tit fluttu niðan á Flat og tá vóru vit altíð saman álíkavæl, tá fekst tú so deiliga stórt kamar afturímóti tí, sum vit vóru von við niðri í Bókbindaragøtu.

Góði Gunnar, eg havi bara góð minni um teg. Tú var altíð glaður og positivur, eg minnist so væl, at tá vit onkuntíð klandraðust við hini børnini, vit spældu við, so var tað altíð tú, sum steðgaði tí og ornaði alt, so vit øll aftur vóru góð og spældu víðari. Tú hevði serligar eginleikar til at fáa alt gott og hugnaligt aftur, og serliga tað havi eg altíð virðismett teg fyri. Tú bleiv við at vera soleiðis, eisini sum vaksin, tú lýsti upp alla staðni har tú kom. Øll, sum kendu teg, hava bara gott at siga um teg. Tú var so arbeiðssamur, alla staðni har tú hevur arbeitt var tú ongantíð bangin fyri at gera ov nógv, tú gjørdi altíð okkurt eyka fyri at fáa alt so fullkomið sum gjørligt, og tað hevði tú so góðar møguleikar at vísa í tínum starvi sum tænari og flogskarvur, sum tú sjálvur nevndi teg, tá tú fleyg við Atlantic Airways.

Tað er ofta soleiðis, at fólk verða mest róst tá tey eru farin, og tað hevur tú so sanniliga eisini fingið frá teimum, sum hava møtt tær í tínum starvi, og í slíkum starvi møtir ein sera nógvum menniskjum.

Vt eru øll sett sum tænarar hjá Harranum her á jørð. Tú var alt ov stutt her á jørð saman við okkum. Men tú náddi í hvussu so er at tæna honum, tí tú var so góður við øll menniskju, serliga tey veiku og tey, sum ikki høvdu tað so gott. Nú hevur tú fingið tað gott heima í himmiríki, og har fara vit øll at møtast aftur ein dag, og at vita tað hjálpir okkum øllum í okkara stóra sakni og sorg, sum vit sita eftir við.

Eg vil hervið lýsa frið yvir minnið um mín elskaða systirson Gunnar Berg.

**Margrith mostir**

## Minningarorð um
# Selmu Kjærbo
## úr Fuglafirði



So komu deyðsboðini um Selmu. Hetta var sunnudagin tann 2. november. Selma var dóttur Malenu og Óla Petersen. Óli var ættaður av Miðgerði í Kollafirði, hann giftist til Fuglafjarðar og gjørdist reiðari.

Selma giftist við Daniel Jacob (kallaður Dolli) úr Sumba. Hann doyði fyri 14 árum síðan, so hon hevur sitið einkja øll hesi árini.

Selma var ein sjáldsom kona at koma inn til, hon var sera blíð og hon dugdi væl at fortelja frá, bæði álvara og gaman.

Tey seinastu árini var heilsan farin at bila og nú vóru kreftirnar upp, tí eingin yvirlivir deyðan her á fold. Selma gjørdist 81 ára gomul.

Tað, sum eg minnist Selmu eina best, ja ongantíð fari at gloyma, tað var fyri eini gott og væl 58 árum síðan. Eg havi verið um 22 ár, tá hon og ein vinkona stóðu framman fyri talarastólinum í Thabor og sungu fyri fullum húsi. Báðar høvdu sera gott mál.

Tey kvøldini vóru mong eygu vát av gleðistárum av at hoya teirra sangir. Hetta var eisini ein stórur vitnisburður um teirra frelsara Jesus.

Saknurin verður stórur, nú Selma er farin, og er hann serliga stórur hjá teimum trimum børnum hennara og ommubørnunum. Men einaferð koma øll saman aftur, tá tíðin er komin.

Eg haldi at abbabeiggi mín yrkti eitt so vakurt og sigandi ørindi í einum sangi.

*Jesus Kristus far ei frá mær!*
*So eg biði nátt og dag.*
*Jesus, bróðir! ver tú hjá mær!*
*Leið meg heim mín síðsta dag.*

Guds friður hvíli yvir minni hennara.

**Símun P. Poulsen**

## Andlát

29. november
Ann Gunnhild Marr Poulsen, 69 ár
Óli Hans Kjalnes, 68 ár

30. november
Alf Henriksen, vanliga nevndur Alf á Cafénum, ættaður úr Vági, búsitandi í Øravík, 72 ár

2. desember
Hansy Elisabeth Højgaard, Hoyvík, 79 ár

3. desember
Pauli Joensen, fyrrverandi lærari, Skála, 74 ár



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Niels Pauli Danielsen 65 ár



Í dag, leygardagin 6. desember, fyllir Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur og fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaður, í Klaksvík, 65 ár. Niels Pauli er ættaður úr Vági. Foreldini vóru: Elsa og Hilmar S. Danielsen í Vági. Elsa var úr Vági, og Hilmar var ættaður av Teigum í Fámjin.

Niels Pauli tók sum ungur studentsprógv upp á tvey ár í Danmark. Síðan var hann vikarur við Klaksvíkar Skúla í eitt ár. Eftir tað sigldi hann m.a. við sluppini "Fimm systrar" hjá Simon David Kalsø í Klaksvík.

Hann fekk Gudfrøðisligt embætisprógv í Keypmannahavn í 1968. Hann var prestur á Viðareiði frá 1968-73, í Sjóvar sókn frá 1973-80. Síðan 1980 hevur hann verið prestur í Klaksvík.

Hann var í farloyvi frá 1985-88, tá hann var Landsstýrismaður fyri Kristiliga Fólkaflokkin, Føroya Framburðs- og fiskivinnuflokk. Hann var løgtingsmaður frá 1988-94 fyri flokkin, valdur í Norðoya valdømi.

Hann sat í bygdaráðnum á Viðareiði frá 1970-74 og í Sjóvar kommunu frá 1977-80.

Niels Pauli er giftur við Elsebeth, f. Kalsø, úr Klaksvík, tey eiga synirnar Hilmar og Olgar. Elsebeth og Niels Pauli eiga 7 ommu- og abbabørn.

Føðingardagurin verður hildin í KFUM og K í Klaksvík frá kl. 18, har øll eru vælkomin.

## Aimi Justinussen MBA í økonomi



Leygardagin 29. november tók Aimi Justinussen á Argjum prógv sum MBA í økonomi við Heriot Watt University í Edinburgh.

Aimi er úr Sandavági, dóttir Janny og Gudmund Gudmundsen. Hon tók útbúgving sum marknaðarøkonom á handilsskúlanum í Næstved í 1996. Síðan arbeiddi hon á marknaðardeildini hjá Føroya Sparikassa frá 1996 til 1999, tá hon fekk starv sum skrivari hjá Amerada Hess í Havn.

Í nøkur ár hevur hon hevur tikið MBA útbúgvingina sum fjarlestur, men seinasta hálva árið hevur hon verið í Edinburgh, og leygardagin 29. november fekk hon so prógvið handað.

Aimi er gift við Helga Justinussen, politisti, úr Havn, tey búgva á Hamr-inum á Argjum og eiga tveir synir, Ásmundur og Gudmundur.

# Parfumarí Drós skift eigara



*Kristbjørg Poulsen hevur yvirtikið Parfumarí Drós í Bøgøtu 15*
*Mynd: Maria Olsen*

**Parfumarí Drós í Bøgøtu 15 í Havn hevur skift eigara. Kristbjørg Poulsen á Argjum hevur yvirtikið handilin frá fyrrverandi eigarunum, Fíu Norðberg og Karin Dahl**

Handilin, sum í fleiri ár var Áarvegnum, flutti fyri tveimum árum síðan niðan í Bøgøtu 15. Í hesum bygninginum eru tilsamans fýra handlar.

Kristbjørg, sum er ættað úr Skopun, er 36 ára gomul. Hon hevur arbeitt nógv í handli og tók av hesi spennandi avbjóðing, tá handilin var til sølu.

Parfumarí Drós umboðar merkini Estee Lauder, Clinique, Originis og Aramis.

## Brúdleyp

Í dag, 6. desember, kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Joan Símunardóttir Poulsen úr Oyndarfirði og Bjarni Joensen av Tvøroyri.

Brúdleypið verður hildið á Hotel Øravík kl. 19.00 fyri innbodnum.

Í dag, 6. desember, giftast í Vestmanna kirkju Joan Marie Juul Poulsen úr Tórshavn og Gert Johannesen úr Vestmanna.

Veitslan verður í Bygdarhúsinum fyri innbodnum.

## 65 ár

Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur, Klaksvík, fyllir 65 ár í dag, Niklasarmessa 6. desember

Føðingardagurin verður hildin frá kl. 18.00 í KFUK og -K í Klaksvík, har øll eru vælkomin.

## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Poul í Skorini**
Tórshavn, ættaður av Eiði

lá sjúkur, andaðist og varð jarðaður.
Somuleiðis takka vit eisini Heimarøktini, starvsfólkunum á B5, tykkum, sum fylgdu, sum á ymsan hátt hjálptu til við ervinum, sum góvu Zarepta eina gávu, sum sendu blómur, krans ella heilsanir, Dupultkvartettini, urguspælara, og talarum fyri troystarrík orð.

*Familjunnar vegna*
**Mia, Ragnhild, Sámal og Róland**

# Tøkk

Eg takki øllum á Sandi
og runt um í Føroya landi
tit hond mína tóku, tit vóru so mong
og øll tit, ið vundu flagg á stong
fyri vakrar blómur tit sendu mær tá
og øll tit sum gólvið stukku inn á
samrøður mangar tær gjørdu mær gott
telegrammini øll tey meti eg hátt
gávurnar allar tær gleddu meg mikið
løni tykkum faðir í himmiríki
alt hetta veitti mær stóra gleði
á mínum sjúti ára degi

**Sóvit Simonsen, Sandi**